**Býráðsfundur mánadagin 25. juni 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Svenn Olsen, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen, Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **12/00205**<br>**Umsókn frá Leirvíkar kirkju at leggja slangu frá kirkjuni og oman á sjógv**<br>Vegna Leirvíkar kirkju verður søkt um loyvi at leggja 110 mm slangur frá kirkjuni og oman á sjógv.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at leggja málið fyri býráðið. | Málið ikki búgvi til støðutakan. |
| **2.** | **12/00214**<br>**Umsókn frá Fríðfinnur Johnsson um at leggja slangu frá sethúsinum og oman á sjógv**<br>Umsókn um at leggja rør/slangur frá sethúsinum hjá Fríðfinni og út á sjógv. Slangan/rørið skal brúkast til sjóhita.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at leggja málið fyri býráðið. | Málið ikki búgvi til støðutakan. |
| **3.** | **12/00206**<br>**Umsókn um fíggjarligan stuðul til viðlíkahald og keyp av útgerð**<br>Losjan Glotti hevur sent kommununu tvær umsóknir um stuðul. Onnur er til keyp av útgerð, kostnaðarmetingin fyri hetta er íalt 280 t.kr. og hin er til viðlíkahald av bygninginum kostnaðar-metingin er uppá íalt 117 t.kr.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at veita stuðul á 50.000,00 til víðlíkahald av bygninginum. Av tí at játtanin sum trivnaðarnevndin hevur at ráða yvir er brúkt, verður mælt til at fíggjarnevndin finnur pening til endamálið. Trivnaðarnevndin mælir eisini til at peningur verður avsettur til keyp av útgerð á fíggjarætlanini fyri 2013.<br><br>Fíggjarnevndin er samd um at beina málið í býráðið til støðutakan. | Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá trivnaðarnevndini.<br><br>Peningurin verður tikin av 3.26.11.510-10 **(Barnagarðar)** |

**Býráðsfundur mánadagin 25. juni 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Svenn Olsen, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen, Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**4. 12/00144**
**Keyp av arbeiðsbili**

Á fundi í teknisku nevnd tann 18. apríl 2012 var samtykt at fáa tørvslýsing av bilinum, last í kann vippa, krana, 2 ella 4 hjólstrektur og møguliga saltkassa v.m., og málið skuldi leggjast fyri teknisku nevnd aftur.

Upplýsingarnar liggja í málinum saman við tilboðum uppá bilin, krana, vippulast v.m.

Kostnaðurin fyri bilin er kr. 385.000,00
----------------fyri vippulast kr. 54.000,00
Kostnaðurin fyri krana v.m. er kr. 150.000,00
Kostnaðurin fyri saltkassa er kr. 67.000,00

Allar upphæddir uttan mvg, samlaði kostnaðurin verður sostatt kr. 697.000,00 kr. við mvg.

Á konta 6.38.13.511 er játtað kr. 300.000,00 (løgujáttan), og tí er neyðugt við eykajáttan kr. 397.000,00

Tekniska nevnd hevur á fundi tann 13. juni samtykt at mæla til at keypa nýggjan bil og annar bilur fer úr bilparkini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd, men at keypið verður útsett til um ársskifti, og at peningurin sum restar í verður settur av á fíggjarætlanini fyri 2013.

Svenn Olsen skjýtur upp at hildið verður fast við ætlanina um at nýta avsetta peningin til at endurnýggja verandi bilpark.

Fyrst beiv atkvøtt um uppskoti hjá Svenn Olsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Svenn Olsen
Jan E. Petersen
Tollakur Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Steintór Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Jóhan Christiansen

Uppskotið hjá Svenn Olsen er sostatt falli.

Síðani bleiv atkvødd um uppskotið hjá fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Steintór Jacobsen
Jan E. Petersen

**Atkvøddi blankt:**
Svenn Olsen
Tollakur Joensen

Uppskotið hjá fíggjarnevndini er sostatt

**Býráðsfundur mánadagin 25. juni 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Svenn Olsen, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen, Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

samtykt.

**5. 12/00224**
**1.viðgerð av eykajáttan til kirkjugarðin í Norðragøtu**

Borgarstjórin hevur setur fram fyrispurning, um at flyta kr. 500.000,00 frá konta 6.22.11.510 byggibúning bústaðir (Løgujáttan) til konta 6.24.51.510 Kirkjugarðar (Rakstrarjáttan) at stoypa kirkjugarðinum í Norðragøtu.

Tekniska nevnd mælir til at flyta 500.000,00 kr. játtan millum omanfyrinevndu konti og at stoypa garð rundan um kirkjugarðin

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Einmælt samytkt at útseta málið til fyrsta býráðsfund eftir summarfrítíðina.

**6. 12/00023**
**Keyp av Limmilund**

Málið hevur verið fyri í nevndum og býráðnum fyrr, síðstu ferð á býráðsfundi tann 30. januar 2012. Tá bleiv samtykt at heimilað umsitingini at samráðast um ein prís við eigaranar. Samskifti og fundur hevur verið millum kommununa og Hagastýrið, og hevur Hagastýrið boðið kommununi Limmilund til keyps fyri 50% av dagsviðinum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 18. juni 2012 mælir til at bjóða Ognarhaganum ein prís sum er 15% av dagsvirðið fyri hagajørð, sum er í tráð við vegleiðingina frá landsskógarvørðinum.

Málið tikið av skrá

**7. 12/00064**
**Keyp av plantuøki í Syðrugøtu**

Festarin Jákup Øre hevur sent Eysturkommunu fyrispurning um kommunan keypir plantuøkið á matr. nr. 114a í Syðrugøtu.

Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi tann 15. mars 2012, og mælti til at støða verður til málið, tá íð avgerð er tikin í máinum viðv. keypi av Limmilundini í Leirvík. Fíggjarnevndin samtykt á

Málið tikið av skrá

fundi tann 19. mars at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi tann 18. Juni 2012 og mælir til at bjóða festaranum sama tilboð, sum kommunan bjóðar Ognarhaganum í Leirvíka. T.e. ein prís sum er 15% av dagsvirðið fyri hagajørð.

**8. 12/00230**

**Sáttmáli um leið 410**

Verandi sáttmáli gongur út tann 1. januar 2013, møguleiki er at leingja sáttmálan í 2 ár, og hevur Strandfararskip Landsins sent Eysturkommunu um hon er sinnað at leingja sáttmálan.

Fíggjarnevndin mælir til at leingja sáttmálan við tveimum árum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Endaligi sáttmálin skal leggjast fyri býráðið til støðutakan.

**9. 12/00232**

**1.viðgerð av eykajáttan til konto 6.38.11.510 (Vegir)**

Av tí at ætlaðu sparingarnar á tekniska økinum ikki vóru gjørdar, kemur játtanin til vegir ikki at halda.

Tilmæli frá kommunustjóranum fyriliggur. Mælt verður til at veita eina eykajáttan á kr. 270.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av konto 3.26.11.510-10 **(Barnagarðar)**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**10. 12/00231**

**1.viðgerð av eykajáttan til konto 1.11.14.510 (kommunufyrisiting)**

Av tí at ætlaðu sparingarnar í kommunufyrisitingini vóru gjørdar, kemur játtanin til kommunufyrisiting ikki at halda.

Tilmæli frá kommunustjóranum fyriliggur. Mælt verður til at veita eina eykajáttan á kr. 190.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av konto

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 25. juni 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Steintór Jacobsen, Svenn Olsen, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Hanna Jensen, Fríðgerð Heinesen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

3.26.11.510-01 **(Dagrøkt)**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**11.** **12/00201**
**Skrivstovuhølir til umsitingina og býráðið**
Á seinast býráðsfundi bleiv samtykt at arbeiða víðari við málinum

Tilmæli frá kommunustjóranum og tekniska leiðaranum fyriliggur.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska leiðaranum.

Tollakur Joensen skjýtur upp at málið verður útsett til komandi býráð at taka støðu til.

Fyrst bleiv atkvøtt um uppskoti hjá Tollaki Joenen

**Atkvøður fyri:**
Páll Isholm
Steintór Jacobsen
Jan E. Petersen
Svenn Olsen
Tollakur Joensen

**Atkvøddi blankt:**
Jóhan Christiansen
Hans Mourits Foldbo

Sostatt er uppskotið samtykt.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ____________________

Tollakur Joensen ____________________

Svenn Olsen ____________________

Steintór Jacobsen ____________________

Jan E. Petersen ____________________

Páll Isholm ____________________

Hans Mourits Foldbo ____________________